Bárður á Steig Nielsen
vegna Sambandsflokkin
Beinir Johannesen
vegna Fólkaflokkin
Jenis av Rana
vegna Miðflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Øktur barnafrádráttur í landsskattinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 153 frá 19. desember 2023, verður í § 2, stk. 1, 1. pkt. “kr. 9.200” broytt til: “kr. 11.200” og “kr. 6.500” broytt til: “kr. 8.000”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2025.

Almennar viðmerkingar
Seinasta tíðin hevur verið sera nógv merkt av prís- og avgjaldshækkingum, og hevur tað gjørt, at mangar familjur eru fíggjarliga sperdar. Príshækkingar koma sum steinur omaná byrðu hjá barnafamiljum, ið frammanundan eru merktar av fíggjarstøðuni. Tískil er tað neyðugt, at geva barnafamiljum ein fíggjarligan lætta.

Eisini vísa tølini í løtuni, at burðartalið er fallandi. Hvør orsøkin er til tað, er torført at siga, men málið má vera, at tað ikki er tað fíggjarliga, ið forðar fólki at seta á stovn familju. Hetta uppskotið er eitt stig rætta vegin at lætta fíggjarliga um.

Tí verður skotið upp at hækka barnafrádráttin við 2.000 kr. um árið fyri børn undir skúlaaldur og 1.500 kr. um árið fyri børn frá 7 til 17 ár.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Fíggjarligar avleiðingar:
Uppskotið verður mett at kosta landskassanum einar 23 mió. kr. í mistum inntøkum. Tó kann væntast, at nettoútreiðslurnar eru lægri, tí nýtslan økist.

Umsitingarligar avleiðingar:
Uppskotið hevur ikki nógvar umsitingarligar avleiðingar, av tí tað bert eru smáar broytingar.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Barnafrádrátturin hækkar úr kr. 9.200 til kr. 11.200 fyri børn undir skúlaaldur og úr kr. 6.500 til kr. 8.000 fyri børn í skúlaaldri og upp til 17 ár.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 7. mars 2024

Bárður á Steig Nielsen	Beinir Johannesen	Jenis av Rana